FØROYA LANDSSTÝRI

**Skipaeftirlitið**
FAROESE MARITIME AUTHORITY
*MINISTRY OF FISHERY AND MARITIME AFFAIRS*

# Tvey skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir eftir tveimum skipaeftirlitsfólkum, einum verkfrøðingi og einum skipsførara.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum, men virkar dagliga sum sjálvstøðugur stovnur, við skrivstovu í Miðvági. Skipaeftirlitið arbeiðir saman við klassafeløgunum og øðrum undirveitarum um eftirlit við skipum og bátum. Tætt samskifti er við vinnuna í hesum sambandi.

Størvini sum skipaeftirlitsfólk umfata í høvuðsheitum arbeiðið á skrivstovuni í Miðvági og nakað av arbeiðið uttanfyri skrivstovuna.

**VERKFRØÐINGURIN**
**Starvið hjá verkfrøðinginum inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:**
- góðkenning av tekningum í sambandi við ný- og umbyggingar
- onnur málsviðgerð og uppfylging
- eftirlit við skipum og bátum
- eftirlit við góðkendum glasfipurverkstøðum
- uppbygging av skipanum
- luttøka í tværgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv**
til starvið krevst útbúgving:
- sum skipsverkfrøðingur
- ella sivilverkfrøðingur
- ella annar verkfrøðingur, sum er serkønur innan sjóvinnu
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður kravt, at viðkomandi luttekur í eftirútbúgvingum har tað er neyðugt fyri at røkja dagligu uppgávunar.

**Setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya verkfrøðingafelag.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**SKIPSFØRARIN**
Starvið hjá skipsføraranum inniber í høvuðsheitum hesar upppgávur:
- eftirlit við skipum, bátum og trygdarskipanum
- viðlíkahald av formularum til skipsskjøl
- uppbygging av viðlíkahalds- og trygdarskipanum til fiskifør
- luttøka í tværgangandi uppgávum á Skipaeftirlitinum, undir hesum verkætlanum

**Førleikakrøv**:
- til starvið krevst útbúgving sum skipsførari við sjóvinnubrævi sum skipsførari, STCW II/2
- teldubrúkari við góðum kunnleika til MS-office forritini
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli

Kravt verður eisini, at umsøkjari hevur fimm ára royndir sum skipsyvirmaður

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring) ISO 9000, ISM og ISPS.

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður kravt, at viðkomandi luttekur í eftirútbúgvingum har tað er neyðugt fyri at røkja dagligu uppgávunar.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt í 8. flokki í sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið, haraftrat verða veittar 3000,- kr. í viðbót um mánaðin fyri álagt úrtíðararbeiði í upp til 35 tímar um ársfjórðingin.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 26. apríl 2006, kl. 14.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið,**
Postsmoga 26, 370 Miðvágur

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.

BRIO. hauck Simo CARENA
**Flugunet & regnskjól fylgja við ókeypis.**



Keyp barnavogn frá okkum og fá 10% av alla vøru í eitt heilt ár.

B&B ...eitt sindur betri
*Baby & Barnaútgerð*
Niels Finsensgøta 12 - Tórshavn - 315101



**LOYSNIN!**
**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**
**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**
**Vit eru serkønir í at gera:**
Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

**MARCO POLO**
*STARVSFÓLK SØKIST*
*Hervið verður søkt eftir starvsfólki til matstovu okkara*
*Fyrimun hava umsøkjarar við góðum lyndi og royndum innan tænastuyrkið*
*Nærri fæst at vita á tel. 21 34 30*
*Restaurant*
**MARCO POLO**
*Tlf 31 34 30 · www.marcopolo.fo*

**GSM telefonir &**
**GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar**
**Storno**
SØLA & TÆNASTA
Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo

***Arbeiðshandskar***
*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*
Beinleiðis frá framleiðara
**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar
**ADC-Heilsølan** spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo
Sosialurin 311820

**Nýggjar**
**TANNPROTESUR**
**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**
Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð
Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12
Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480